# Nýggjur sandbátur við Saltangará

**Mánakvøldið legði Havfrakt at bryggjuni við Saltangará. Hetta er nýggjasta skipið hjá Frak- og Sandsøluni á Glyvrum**

SKIP
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*John á Líknargøtu var skipari á fyrsta túrinum. Um vikuskiftið gongur leiðin til Noregs, har skipið skal í sigling*

*Mynd: vilmund Jacobsen*

Frakt- og Sandsølan keypti beint fyri jól nýggja skipið í Noreg, har tað hevur verið í vinnu seinastu tíðina.

Skipið er annars bygt í Hollandi í 1980, og er knappar 66 metrar langt og knappar 11 metrar breitt. Motururin er ein 1200 hk MAC. Havfrakt lastar 1500 tons av sandi, og tekur tað um fýra tímar at lasta og lossa.

Síðani føroyska reiðaríið keypti skipið, hevur hetta verið í Pólandi, har tað hevur fingið eina ordans yvirháling.

Virksemið hjá Sand- og Fraktsøluni er við nýggju íløguni komið upp á fimm skip, har til samans 35 fólk eru á lønarlistanum.

# Tryggingarnar góvu undirskot

**P/F Trygd hevði í fjør eitt yvirskot á 1,7 mió kr. Beinleiðis tryggingarvirksemið gav tó hall**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ársoknskapurin vísti eitt yvirskot á 1.720 tkr., sum leiðslan tó ikki metir vera nøktandi. Munurin millum trygginarinntøkur og -útreiðslur, var nevnliga 1.145 tkr. skeiva vegin, og hetta metir leiðslan ikki vera nøktandi.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at gongdin serliga er ávirkað av eini keðiligari skaðagongd, har bila-, sethúsa- og sjóvátryggingar øll hava givið hall. Somuleiðis hevur marknaðurin verið merktur av harðari kapping. Eitt trýst, sum í sjálvum sær eisini minkar um inntjeningina upp á tryggingarnar.

**Framhaldandi vøkstur**

Í aðrar mátar tykist tó, sum er leiðslan í felagnum nøgd um gongdina.

Bruttoinngjøldini frá tryggingum øktust í fjør við 17% - úr 56,8 í 66,4 mió kr. Framhaldandi vøkstur er eisini tað, sum leiðslan hevur sett sær fyri. Í hesum sambandi eru umfatandi bygnaðarbroytingar framdar, soleiðis at økta starvsfólkatalið eisini skal geva úrslit í eini betraðari tænastu til kundarnar. Við árslok 2005 starvaðust 22 fólk hjá Trygd, og eru hetta 8 fleiri enn eitt ár frammanunda.

## Little Fish eru nú fýra

Fredericia bólkurin Little Fish við framúrskarandi føroyska trummuleikaranum Fríða Øster, hevur fingið nýggjan gittarleikara. Talan er um Michael Lund, ið plagdi at spæla í danska bólkinum Kick The Kangaroo.

Hetta ger at bólkurin er farin frá at vera ein trio til eina kvartett. Hetta eru teir upprunaligu limirnir stak glaðir fyri.

Bólkurin hevur fingið sær pláss á tónleikaportalunum myspace og mymusic. Her ber til at lesa um, hvat bólkurin tekst við og hoyra tónleik hjá teimum. Little Fish varð stovnaður í 1996 og spælir egnan rokktónleik.

Fríði Øster telist millum frægastu føroysku trummuleikararnar. Hann hevur spælt við fleiri donskum bólkum ,síðan hann flutti niður miðskeiðis í 90'árunum. Men hann hevur eisini javnan vitjað á føroyska tónleikapallinum í nógvum ymiskum bólkum, ikki minst saman við pápa sínum Ólavi Øster. Fríði hevur eina fortíð í bólkum sum Utopia, Kjølum, Lisa sær Dupult og MC-Hár.

**- nud**


formula.fo



miðlahúsið
í Vágsbotni

Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. apríl kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".

Vinningurin er ein Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 fartelda frá Formula.fo, virði 7.995,– kr.

Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 hevur m.a.:
· Intel Celeron M380 Processor · 1,6 GHz Celeron proccessor · 1 MB Cache · 512 MB DDR2 RAM PC533 · 60 GB S-ATA Harddisk · DVD+/-RW DL Brennara · VIA N800 Grafikkkort upp til 64 MB · Ljóðkort & Stereo Hátalarar · 10/100 Mbit netkort · 4 x USB 2.0 · 15" WXGA TFT skíggja · Tráðleyst netkort GemTek 802.11 BG · 56K V.90 modem MDC1.5 · Windows XP Pro DK (MUI)

Drigið verður fyrstu vikuna í apríl.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar verða loystar

SUDOKU mars KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 8 | 7 | 1 | | | | |
| | 3 | | | | 5 | 4 | 2 | |
| | 5 | 9 | | | 8 | 7 | | 6 |
| | 6 | 4 | | 2 | | | | 9 |
| 8 | | | 4 | | 3 | | | 7 |
| 7 | | | | 9 | | 2 | 5 | |
| 9 | | 1 | 6 | | | 5 | 7 | |
| | 8 | 5 | 2 | | | | 4 | |
| | | | | 3 | 1 | 8 | | |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 7 | 4 | | | | 6 | 3 | |
| 1 | | | | 3 | | | | 9 |
| | | 6 | 7 | | 5 | 1 | | |
| | 3 | | 6 | | 4 | | 8 | |
| 8 | | | | | | | | 4 |
| | 6 | | 9 | | 7 | | 2 | |
| | | 5 | 3 | | 8 | 4 | | |
| 6 | | | | 4 | | | | 7 |
| | 4 | 7 | | | | 8 | 5 | |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 8 | | | 5 | 7 | |
| 1 | 3 | | | | 5 | | | 9 |
| | | | | | 6 | | 1 | |
| | 2 | | | | 9 | | | 6 |
| | | | | 2 | | | | |
| 6 | | | 1 | | | | 8 | |
| | 6 | | 4 | | | | | |
| 8 | | | 3 | | | | 6 | 7 |
| | 4 | 9 | | | 7 | | | |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | 6 | | 1 | 7 | |
| | 5 | | 2 | 1 | 7 | | | |
| 9 | | | | | | | 3 | |
| 7 | | | 1 | | | | | |
| | | 5 | | | | 6 | | |
| | | | | | 8 | | | 4 |
| | 9 | | | | | | | 2 |
| | | | 6 | 2 | 3 | | 1 | |
| | 4 | 2 | | 5 | | | | |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin | Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo